vónbrotin um, at unga gentan, Marin, liggur her á triðja mánaði. Hetta eigur jú at vera ein stongd deild eftir ávísum aðalreglum, sum krevja, at ein eigur at sleppa útaftur sum skjótast.

– Vit eru hvørki barnaheim ella uppalingarstovnur. Eg haldi, at Finnur Helmsdal átti at pilla av úr løgtinginum og farið á Barnaheimið aftur at gjørt sítt arbeiði, brestur burtur úr henni.

Eyðun fer út við John Dahl og Hansi. Elsa rópar eftir starvsfelaganum:

– Góði keyp mær Ude og Hjemme ...

Afturkomin setur John Dahl seg niður í uppihaldsstovuni. Zacharias Hammer er í sjónvarpinum við eini lýsing um botulismu.

– Botulisma er ikki at spæla við, messar fyrrverandi sjónvarpsmaðurin ávarandi.

Onkur er skjótur at rópa:

– Hvat segði hann? Alkoholisma?

## Undirhald um yvirdosis

Nýggjasti sjúklingurin, Jens Martin, situr í roykilonini í guvum lag. Elsa hevur eisini fest sær í har inni. Hon blæsur royk út í rúmið og hyggur upp á Jens Martin:

– Tú gongur meira nú. Tú ert blivin ordiliga sporti!

Jens Martin mutlar afturmóti:

– Viðhvørt. Tað er tað heila.

– Tað er bara gott. Og hvussu er; lesur tú nakað?

– Nei. Eg fái ikki konsentrerað meg. Tað er tí, eg eri innlagdur. Medisinið má regulerast ella okkurt, sigur hann.

– Kanst tú koyra bil, spyr Elsa.

– Onki problem. Tað er sum at ganga. Men tá ið eg fekk Risperdal, fekk eg eisini konsentrerað meg, svarar hann.

Kristian er komin inn í roykirúmið at drekka kaffi saman við Jóhonnu. Hann spyr hana, um ein onnur Jóhanna arbeiðir her.

– Ein ung ein, nágreinar hann soleiðis, at Jóhanna noyðist at smírast.

Men Kristian hevur eisini álit á hesi Jóhonnu. Hann greiðir frá, at hann hevur verið her 12 ferðir fyrr.

– Tað virkar so ónatúrligt fyri meg. Eg kenni ikki fólkini her. Men eg læri nógv hvørjaferð. Eg havi funnið útav, at man bara skal vera góður við tey fólkini, sum man er saman við. Tað er tað, alt dreyar seg um. Tað haldi eg, sigur hann lágmæltur.

Í uppihaldsstovuni bummar Óli K. ein royk frá Elsu:

– Kann eg læna eina sigarett.

Tú skalt nokk fáa hana aftur, sigur hann tvær ferðir. Elsa handar honum eina langa, silvurlitta Look og leggur dent á, at tað er hetta slagið, sum donsku drotningini dámar best. Óli K. brosar við, knekkar filtrið av royala roykpinninum og fær alt fyri eitt eld frá Elsu.

Jóhanna og Elsa sita nú í friði og binda, meðan onkur annar ikki vil binda frið. Tí ímeðan gongur Marin og melur. Hon og Annika gnisa og gnísta sum smágentur. Eyðun talar at Anniku:

– Slappa nú av!

Eisini Marin heldur munn og fær sær ein temunn ístaðin. Marin situr niðri nakrar minuttir og drekkur. So kveitir hon viðhvørt at sjónvarpinum, reisist, fer yvir til tómligu bókhillina í innvikinum at venda, og setur seg so niðuraftur.

Hóast John Dahl er dølskur, dugir hann at skemta.

– Kann eg fáa nakrar høvuðpínutablettir ... einar átta, sigur hann og brosar sum ein annar Emil í Lønnibergi. Hini flenna; kanska um, at tað at nevna so nógvar tablettir her inni á stongdu deild, fær ein at hugsa um hóttandi hugtakið, yvirdosis.



*Opið heilivágsskáp á stongdu deild*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Hann hevði heilasvull

Dingdong! Dingdong!

Tað er kona John Dahl, sum ringir uppá. Inni í vitjanarrúminum ger hon greitt, at hon vil vera saman við John, tá ið hann verður skannaður í høvdinum um nakrar dagar. Hon er somikið greið yvir dølsknið, ið hevur rakt mannin, at hon tosar um hann í triðja persóni, meðan hann situr undir liðini á henni.

– Hann var heilt høgur fyri nøkrum mánaðum síðan, men síðan hevur hann skift ham. Hann snakkar svart og minnist einki longur; ikki so frægt sum litin á nýggja bilinum. Og so hevur hann mist eini 15 kilo, greiðir hon kroyst frá. John Dahl hyggur upp á konu sína:

– Eg fái ikki ordiliga svølgt. Er tað ókey, at eg fari inn at hyggja í sjónvarp?

Áðrenn hann fer, spyr konan hann, um mamma hansara kemur at vitja aftur. John Dahl hyggur aftur upp á konuna. Hann sær út til at kýta seg at fáa víst henni onkra kenslu:

– Eg leggi ikki í. Bara tú ert her ...

Hon kínir honum skjótt niður eftir arminum og svarar sera blídliga og eitt sindur kroyst av kærleika, ótta ella báðum:

– Ja, ja, góði …

Har er komið eitt skott millum teirra. Ein óvikiligur veggur, sum er gjørdur úr onkrari enn ókendari sjúku.

Elsa spyr síðan John Dahl, um hann er troyttur.

– Ja, svarar hann, smílist fitt og rembir sær.

Konan greiðir frá, at alt byrjaði fyri okkurt um einum ári síðan. Tað uddi og kreyp í húðini á honum. Dølsknið er bara seinasti parturin av tilgongdini. Konan noyðist bara at vera krútsterk. Hon hevur fleiri børn at taka sær av og onkran annan næstring, ið er álvarsliga sjúkur.

Elsa hugleiðir um sjúkumøguleikarnar. Dissiminerað sklerosa og alzheimers verða nevnd. Tá ið so orðið, tumor, at enda verður sagt, gellir tað eftir í tøgnini. Hetta er tað seinasta, ið konan ynskir.

(Tveir dagar seinni varð staðfest í skannara, at John Dahl hevði heilasvull, sum Elsa hevði so greiðan illgruna um. John Dahl fekk vakstrartálmandi heilivág og varð sendur til viðgerðar uttanlands í stundini, HM).

## Bláa hurðin í lás

Gjøgnum alla vaktina sæst, at gongin livir upp til heitið. Har verður gingið nógv. Aftur og fram, aftur og fram. Og so verður steðgað á uttan fyri skrivstovuhurðina. Einaferð dukar Óli K. upp á glasdyrnar. Hann vil aftur hava eld. Elsa brosar alskin til hansara og sigur:

– Lat meg fáa eitt smíl frá tær, nú ið eg ikki fekk nakað frá Bill Clinton!

So bankar aftur uppá. Tað er Annika. Hon ýlir:

– Eg eri beeengin!!!

Eyðun og Elsa fara út til hennara, og Annika ýlir aftur:

– Medisiiin! MEDISIIIN !!! Beeengin fyri manninum !!!

Tveir minuttir aftaná fær hon flenniflipp saman við Marini.

Um tíggjutíðina stendur Elsa og skamtar heilivág til náttina í ein bakka. Onkur fær Abilify og annar fær Zyprexa móti psykosum. Óli K. kemur framvið at fáa sítt:

– Eg bleiv púra svakur av Zyprexa! Ja, eg hevði tað av h til! Men so fekk eg ordiliga nógv Nozinan ístaðin, sigur hann.

Elsa lurtar og skamtar víðari frá hillunum við antiepileptikum, antipsykotikum og antidepressiva. Enn er eingin vekt at viga tunglyndi á, men heilivágur virkar aloftast.

Tað skilst, at sjálvt um karmarnir á staðnum eru afturúrsigldir, er altíð nógvur nýggjur heilvágur.

Ímeðan Elsa skamtar, stendur Marin og hyggur. Hon togar í seg sjálva innankjálka, sleingir miðleyst við ørmunum og flennir. So tigur hon og stillar seg í hurðaopið at sveiggja mjødnina úr karmi í karm.

Elsa fer niður í hálva tíð, boðar hon frá undir rapporteringini klokkan ellivu, men Kári veit, at Elsa ikki fær verið arbeiði sítt fyri uttan. Hann er knappur at skjóta:

– Hví byrjar tú ikki við at lata vera við at taka eykavaktir!

Sum tað seinasta hugleiðir Elsa um undangongumenninar, Eyðun Joensen og Árna Olsen. Blómaskeiðið hjá supergeneralistunum er passé.

– Eyðun kundi tosa um kalvasalat og kreppuherðindi í einum. Nú er tað blivið til tað, at man skal »koma til supervisjón klokkan 15.20«, sigur hon hermandi og sleingir jakkan upp á seg. Vaktin er liðug, og vit fara út gjøgnum ytstu deildarhurðina. Bláa hurðin, ið skal latast upp við lykli báðumegin, verður spakuliga svingað inn í reyða karmin og í lás.

Stongt er so leingi arbeiðið varir.

*Øll nøvn teirra innløgdu eru berur heilaspuni.*

## Næstu ferð

Klokkan níggju henda morgunin koma landslæknin Høgni Debes Joensen og løgreglumaðurin, Kári Thorsteinsson. Teir skulu fremja eitt av umleið fimmti líksýnum, ið teir hava um árið. Høgni kagar gjøgnum sjúkrasøguna hjá manninum. Dungin av pappírum um tann deyða er ikki serliga digur. Ímeðan hjálpir Kári Ova at lata líkið úr. Ove bindur band um hjúnabandsringin hjá deyða manninum, smyr uppvaskisápu á fingurin og togar hann av. Buksur og undirbuksur verða kliptar av, men onkur pløgg verða tikin av í heilum líki og løgd saman av einslistum til tey avvarðandi. Nú er maðurin nakin, sum tá ið hann troðkaði inn í lívið.

**Í sjeyndu og seinastu greinini í røðini um Lívið á Landssjúkrahúsinum er Høgni Mohr við til líkskurð. Les reportasjuna í næsta Vikuskifti.**

Sosialurin